## Fongslini full

Tað er trongligt í teimum íslendsku fongslunum. Sambært Morgunblaðnum hava fongslini pláss fyri 137 fangum, og higartil í ár hava 136 klivar verið í brúk hvønn einasta dag. Í dag sita 131 fólk í fongsli, men harafturat sita 14 fólk í varðhaldi, og tí hava fongslini í løtuni fleiri gistandi, enn tey hava pláss til. Morgunblaðið hevur fingið upplýst, at í fleiri førum eru tveir fangar í sama kliva. Ein orsøk til trupulleikarnar er, at fongslið á Akureyri verður umbygt í løtuni.



## Chapman ikki leyslatin

Maðurin, sum myrdi Beatles-legenduna, John Lennon, er fyri fimtu ferð noktaður royndarleyslating. Tað var Mark David Chapman, sum í 1980 skjeyt og drap John Lennon. 53 ára gamli drápsmaðurin hevur siið handan rimar í 27 ár, og skal í hvussu er sita tvey ár aftrat, áðrenn hann kann søkja um royndarleyslating. Umbønin um leyslatingina varð avvíst við teirri grundgeving, at tað ikki var í landsins besta áhuga. Einkjan hjá John Lennon, Yoko Ono, hevði persónliga biðið um, at Chapman ikki varð latin leysur.

# Taka grundarlagið undan fiskidag



**- Vit áttu heldur at staðið saman um okkara fiskidagaskipan úteftir enn at undirgrava hana, sum nú verður gjørt. Hetta er ein góð skipan, um hon verður umsitin við hegni og skili, sigur formaðurin í Felagnum Línuskipum, Jóhannus M. Olsen**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jóhannus M. Olsen er formaður í Felagnum Línuskipum, og hann var eisini millum teirra, sum fylgdi viðgerðini á tingi í morgum. Jóhannus er reiðari á fleiri línuskipum, og nú skip og bátar eru komin til Havnar at liggja, meðan viðgerðina á tingi av fiskidøgum fyri komandi fiskiár fer fram, eru eisini tvey av hansara skipum við, línuskipini Sigmundur og Eysturoyingur.

Onnur línuskip, sum eisini eru komin til Havnar at liggja, eru Jákup B og Klakkur úr Klaksvík. Harafturat eru smærri trolarar og fleiri útróðrarbátar.

Jóhanus M. Olsen sigur, at hóast skipa-og bátatalið, sum er komið til Havnar við fiski-og útróðrarmonnum at fylgja tingviðgerðini, ikki er so stórt, tekur vinnan fult undir við at venda sær ímóti ætlaðu skerjingunum í fiskidagatalinum, soleiðis sum landsstýrismaðurin, Tórbjørn Jacobsen, hevur skotið upp.

- Undirtøkan er 100%, bæði frá Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagnum og frá Føroya Fiskimannafelag. Støðan er so mikið álvarsom, nú ágangurin á fiskidagaskipanina og fiskiflotan annars er so stórur, at øll fiskivinnan stendur saman um at mótmæla og verja fiskidagaskipanina.

Formaðurin í Línuskipum sigur seg stúra fyri, at løgtingið fer at samtykkja eina skerjing í fiskidagatalinum upp á 20%.

- Tað er mangt, sum bendir á hetta sambært teimum úttalilsum, sum vit hava sæð og hoyrt um dagarnar.

Hann heldur tó ikki, at tingviðgerðin fyrrpartin gav nakra serliga ábending um støðu løgtingsins, tí teir fyrstu, sum høvdu orðið, vóru í fyrsta lagi teir, sum hava skrivað álitið í vinnunevndini.

Jóhannus M. Olsen sigur, at tað verður ein vanlukka fyri fiskiflotan og samfelagið alt, um fiskidagarnir verða skornir við 20% - og uppaftur verri, um skerjingin verður 50%, sum landsstýrismaðurin hevur skotið upp.

- Vit, sum eru í vinnuni, harmast um, at politiski myndugleikin nú er í holt við at avtaka sína egnu fiskiveiðiskipan – eina skipan, sum bæði vinna og politikarar hava verið fegnir um.

Hann sigur, at við ætlaðu broytingunum verða so ógvuslig "inntriv" gjørd í hesa skipan, sum ikki hoyra heima í henni, samstundis sum myndugleikin ikki brúkar tey amboð, sum liggja í skipanini.

- Skulu fiskidagarnir skerjast, skal sambært lógini um vinnuligan fiskiskap økt veiðitrýst ávísast – og um myndugleikarnir í størri mun ynskja at friða toskin, skulu gýtingarleiðir og aðrar toskaleiðir friðast í samráð við vinnuna ávísa tíð av árinum.

Jóhannus M. Olsen vísir á, at sum er, eru longu 41% av landgrunninum friðað fyri trolveiði.

- Verður uppskotið hjá landsstýrismanninum samtykt – ella vit fáa eina skerjing, sum eitt nú verður 20% - kemur hetta at merkja nógv fleiri enn tey 20% fyri línuflotan.

Hann sigur, at bara við at friða Føroyabanka, verður skerjingin hjá línuflotanum 20%, og við eini minking í fiskidøgum á landgrunninum upp á onnur 20%, verður línufllotin skorin við út við 40% tilsamans.

- Tað ringast av øllum er, at myndugleikarnir nú eru í holt við at avlaga og oyðileggja sína egnu skipan, sum vinna, myndugleikar og fiskifrøðingar hava gjørt í felag. Úrslitið verður, at vit fara at fáa eina aðra skipan, sum fiskifrøðingum hóvar betri.

Jóhannus M. Olsen heldur, at føroyingar áttu at staðið saman um okkara fiskidagaskipan og vart hana úteftir, tí hetta er ein góð skipan, um hon verður umsitin við hegni og skili.

- Í staðin fyri at verja hesa skipan, verður nú roynt at undirgrava hana, sigur formaðurin í Felagnum Línuskipum at enda.



*Heini O. Heinesen tekur eftir øllum at døma ikki undir við sínum egna tilmæli í vinnunevndini um skerjing uppá 20%*
*Mynd: Álvur Haraldsen*